# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Krugmann rætta evnið

Í gjár fegnaðust vit í hesum teigi um nobelfriðarvvirðislønina, sum varð latin fyrfrverandi finska forestanum Matti Ahtisari. Í dag er ikki minni orsøk vera at fegnast um avgerðina um nobelviðrislønina í búskapi til Paul Krugmann. Fleiri altjóða eygleiðarar fegnast um hesa avgerð, og hetta er ikki uttan orsøk. Víst fær Krugmann virðislønina fyri síni ástøði um altjóða handilsviðurskifti, men her er annað og meira, tí Krugmann er kendur viðmerkjari og tiltikin fyri sínar áhaldandi og hvøssu atfinningar til búskapar- og fíggjarpolitikkin hjá Busch fyrisitingini. Tað er í júst hesum høpi áhugavert, at Krugmann telist millum teir fáu búskaparfrøðingar, ið hevur havt rósandi orð um búskaparpolitikkin hjá bretska forsætisráðharranum Gordoin Brown júst í verandi kreppu.

Við atfinningum sínum til rikna politikkin hjá Busch hevur Krugmann gjørt upp við tann nýliberalistiska og neokonservativa politikk, sum amerikanska stjórnin hevur rikið hesi átta árini. Tá Buschstjórnin tók yvir, var amerikanski búskapurin so væl fyri sum ongantíð áður. Almenna og privata skuldin var metlág, avlop á samveldisfíggjarlógini, arbeiðsloysið metlágt og USA høgt í metum um allan heim. Eftir átta árum er alt hetta broytt. Amerikanski búskapurin í sori, bankakervið rapað, arbeiðsloysið er methøgt, og USA er um at missa leiðsluna sum heimsins fremsta stórveldi. Álitið á leiðsluna er í botni, og støðan líkist alt meira støðuni eftir Wall Street skrædlið í 1929.

Krugmann er liberalur búskaparfrøðingur, og hetta merkir í USA vanliga, at ein í politiskum hugburði er vinstrumegin miðjuna. Tað, sum hann hevur funnist at, er skattalættarnir til tey ríku og sosiala og fíggjarliga vanbýtið, sum er úrslitið av nýliberalistisku politikkinum. Hesin politikkur er ikki bert ómoralskur, hann hevur eisini verið beinleiðis skaðiligur fyri alt USA. Í hesum høpi hevur Krugmann eisini víst á, at politikkurin hjá Busch stjórnini beinleiðis hevur máað støðið undan amerikanska fólkaræðinum. Rættartrygdin er viknað, og stjórnin hevur gjørt seg inn á mannarættindini í stríðnum móti yvirgangi, eitt nú við at loyva nýtslu av torturi og tí sum verri er.

Krugmann er sum búskaparfrøðingur sera aktuellur, og hann hevur støðugt gjørt vart við, at ein búskapur undir púra frælsum marknaðarkreftum er skaðiligur og endar við eini búskaparligari vanlukku. Hann fekk rætt í ólukkumát. Hetta átti at givið øllum politikkarum nakað at hugsa um, eisini her í Føroyum, ikki minst tá hugsað verður um, at tað einasta, sum CHE samgongan var samd um var, at í Føroyum skuldu tær frælsu og ótálmaðau marknaðarlreftirnar ráða!

Sambært Krugmann er ein skilagóður blandingsbúskapur tryggasta og hentasta amboðið at tryggja vælferð og búskaparligt rættvísi. Hesi hugtøk eru so aftur besta trygdin fyri friði, fólkaræði og jøvnum býti av samfelagságoðanum. So er bert at vóna, at heimsins ráðandi politikkarar lurta meira eftir Krugmann enn eftir teimum búskaparligu ørvitisfiskunum, ið hava leitt USA og harvið allan heimin út á eggina.

**Sosialurin**

## Valdið á Nesinum

**HERI MOHR**



Í *Punktum.FO* nr. 195 er ein grein við heitinum ”Valdið á Nesinum”. Greinin vil vera við, at klandrið ella ”gølan” í Tinganesi hevur sín uppruna í ágangi á løgmansstjórastarvið, og sum byrjaði í 1998. Ágangur, soleiðis at skilja, at øki, sum hoyrdu stjóraembætinum til, í fleiri førum hvurvu á aðrar hendur.

Hetta er óivað satt, men vit skulu longri aftur í tíðina, fyri at finna tann reyða tráðin.

Fyrstu ferð at álvarsligur ágangur varð framdur ímóti meginumsitingina var í **1963**: Á loftinum í Tinghúsinum var eitt arkiv við almennum skjølum. Hetta arkivið var av sonnum eitt satt listaverk, sum við fagurskrift og akkuratessu valla hevði sín líka um okkara leiðir. Sanniliga lagt úr hondum av einum manni (ætlandi Gunnar Winther, løgtingsgrannskoðara) við serstøkum evnum og listaligum vakurleikasansi. Ein dagin, tá ið hann, ið hetta skrivar, skuldi á tingloftið at finna ávís skjøl í arkivinum, lá alt listaverkið hjá Gunnari Winther sundursorlað tveitt út á gongina. Tað vísti seg, at ein politiskur flokkur skuldi brúka arkivplássið til fundarhøli. Arkivið endaði óivað á brennistøðini. Hvussu slíkt kundi fara fram í sjálvum tinghúsinum, er trupult at skilja.

Í **1985** uppstóð ein nýggjur ”politikkur” úti í Tinganesi, sum m.a. førdi við sær, at skrivstovustjórin í landsstýrinum og skrivstovustjórin á gjaldstovuni vórðu elimineraðir á síðuspor, og eitt nýtt púra ómotiverað og óprofessionelt hierarki við einum proklameraðum forstjóra á odda uppstóð, og ein professionel 40 ára gomul almenn meginumsiting sprotnaði og fór upp í seymingini.

At ein amatørur í høvuðsfyrisiting var komin á rókina við kommiserkendum handalagi fekk álvarsligar og sera óheppnar avleiðingar. Onkur gamal á garði, sum ikki orkaði at ”troða dansin”, bað tessvegna um at vera loystur úr starvi.

Sum árini gingu, varð so endin tann, at hjálp mátti fáast úr Danmark (Norman Christensen) at byggja eina nýggja høvuðsfyriting, sum vónandi mennur seg sterka og trygga við vanligum viti og skili ovast á breddanum.

**1998/01** gjørdist á Nesinum framhald av 1985 /88. Men tá varð eisini Oljumálaráðið (við ongari olju) sett á stovn fyri 90 milliónir. Sjálvstýrismálráðið konstruerað fyri 58 milliónir. 366 milliónir av almennum peningi oyramerktar til skúlaverk og almanna forsorg tveittar á bláman. (Átti at komið í Guiness). Og so framvegis.

Hol fór á svullin í 2008 við sera álvarsligum, men eisini tragikomiskum avleiðingum.

Verður samfelagsins nervaskipan pínd og niðurbrotin við siðspillandi avleiðingum, kann talan verða um nepotismu, eitt virus sum gevur vinum og kenningum serrættindi í politiskari umsiting og í høgum almennum størvum. Úr hesum virusi sprettur servilitetur, tað vil siga undirbrottligheit og sleiskni. Avleiðingin av hesum gerst dekadenca – forfall – í politisku og almennu fyrisitingini, og vanlig eyðkenni eru, at meting um moral dettur sundur og fremur evnaloysi í spurningum um rangt og rætt.

Ein kendur filosoffur hevur sagt, at tá ið broyting, kollvelting hevur fingið samfelagið í upploysing, og tað dettur sundur, fara aðrir skaðar eins og væta at seyra í rivum og sprungum, sum broytingar- nar hava voldað á samfelagsbygnaðin. Men frukturnar av rumblinum lutast sjálvdan provokatørinum, sum rør í og gruggar vatnið til onnur at fiska í, og hesir epigonar (eftirslógarar) eru uppaftur vandamiklari, tí teir virka á sama broytingarstøði, sum syndraði samfelagið.

Hann segði eisini, at ein skal vera sera sjálvglaður og innbilskur, um neyðugt er at oyðileggja støðið undir verandi skipan til tess at seta í verk egnu samfelagsáskoðan.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.